TING-HELLAN

# Vandamál á leiðini

**-Skal útleggingin virka, er tað tó eisini av stórum týdningi, at landið - so hvørt sum kommunurnar fáa fleiri øki at taka avgerð um - ikki samstundis læsir kommunurnar fastar í neyvum lógarásetingum, so at einki er eftir hjá lokala fólkaræðinum at ráða yvir. Vit hava sæð hetta hent - bæði her hjá okkum og í øðrum londum skivar Ingibjørg Berg, stjórnmálafrøðingur í kronikkini í dag**

TINGHELLUKRONIKKUR
*Ingibjørg Berg,*
*stjórnmálafrøðingur*
*ingib@ksf.fo*



Politisk undirtøka tykist í dag at vera fyri at flyta fleiri uppgávuøki frá landi til kommunur at umsita. Hendir hetta, verða fleiri og øðrvísi krøv sett kommunum - bæði til politiska raðfesting og umsiting.

Eitt ið serkennir føroyskar kommunur er, at íbúgvatalið er lágt; umleið 77 % hava færri enn 1000 íbúgvar. Hetta broytist nakað eftir 1. januar í 2005, tá verða 67 % prosent av kommunum at hava minni enn 1000 íbúgvar. Men enn verða bert 3 kommunur at hava yvir 3000 íbúgvar. - Vit kunnu kanska siga, at kommunukortið verður heldur ruddiligari, men virkisførið hjá flestu kommununum fer eisini eftir hetta at vera lítið.

Eitt annað serligt fyri føroyskar kommunur er, at tær hava nógv færri uppgávur enn í øðrum Norðurlondum - helst av somu orsøk: At tær eru ov smáar.

Í útjaðaraøkjunum, serliga í Suðuroynni og Sandoynni, fellur fólkavøksturin og harvið helst eisini inntøkugrundarlagið - samstundis sum tey stríðast við hægri skuld, enn restin av landinum.

Miðstaðarøkini, serliga Tórshavnarøkið, hava øvut trupulleikar við tilflyting, og harvið stórar útreiðslur til útbyggingar.

### Økini: yvirliva og mennast

Ein av stóru avbjóðingunum hjá bæði lands- og kommunupolitikarum í dag er tí, at fáa landið alt at yvirliva og javnviga náttúrliga.

Kommunuálitið, ið varð viðgjørt av bæði kommunu- og landsmyndugleikum, sigur m.a., at málið er at skipa Føroyar í 7-9 stórar kommunur.

Taka vit hesi økini, sum tey síggja út í dag, so eru tey - enn - ikki so ymisk, sum vit kanska hava lyndi til at halda, hvørki íbúgvaliga ella fíggjarliga, men nú gongur skjótt skeiva vegin.

M.a. tí er sera umráðandi at fáa flutt hesum økjum nøkur støðug arbeiðspláss við at leggja kommununum fleiri uppgávuøki at umsita. - Men tað eigur at verða gjørt eftir eini skipaðari ætlan, og ikki sum jólakort frá onkrum landsstýrismanni, sum hin næsti í røðini síðani tekur aftur.

### Orka - og krøv

Mangan hevur verið ført fram, at kommunurnar ikki fara at megna at umsita professionelt. Sum støðan er í dag, kann væl vera, at so er. Men orsøkin er ikki, at kommunurnar eru kommunur, men heldur at tær í dag bæði eru so smáar og hava so fáar uppgávur, at tær ofta hvørki hava orsøk ella orku til at hava nakað serligt av umsiting - og tá ber sjálvsagt ikki til at skapa eitt professionelt støði.

Men tað er greitt, at fleiri almennum tænastum kommun-urnar koma at standa fyri, størri verða krøvini - bæði til raðfesting og til umsiting.

Longu í dag verða størri krøv sett, bæði so og so. Borgarin vil, at vit raðfesta bleytu økini hægri. Kommunurnar merkja tað serliga á barnaansingarøkinum. Borgarin er í dag eisini meira tilvitaður um sín rætt, og at almenna umsitingin virkar sum hon skal. Her hava nýggju lógirnar á fyrisitingarøkinum og Løgtingsins umboðsmaður helst havt sína stóru ávirkan.

Eitt annað er, at tá kommunurnar fáa starvsfólkatung øki, sum lærararnar í fólkaskúlunum og partar av eldraøkinum, fer tað eisini at seta teimum heilt onnur krøv til starvsfólkaumsiting, enn tær eru vanar við í dag - bæði tá snýr seg um at fáa fatur á starvsfólki við góðum førleika, og at fáa tey at mennast og støðast.

Tí er avgerandi neyðugt, at kommunurnar finna saman í størri kommunur, sum megna at veita borgarunum fjølbroyttar tænastur.

### Lokala fólkaræðið – hvønn veg?

Verða kommunurnar størri, verða færri kommunustýrislimir í mun til fólkatalið. Tað vil siga at lutfalsliga umboðanin verður minni, uttan so at vit velja at broyta kommuvalskipanina - Kári á Rógvi, løgfrøðingur, hevði onkra spennandi hugsan um hetta í Tinghellu leygardagin 30. oktober 2004 - men veruliga ræðið hjá kommunustýrunum verður nógv størri.

Fyri tað fyrsta verða fleiri øki hjá teimum at taka avgerð um.

Í øðrum lagi verður møguleikin at taka avgerðir størri - at raðfesta hvussu skattapeningurin verður nýttur, og hvussu viðurskiftini í kommununum verða skipað - tí veruliga fíggjarliga virkisfrælsið verður størri.

Sum er í dag, er ikki stórt annað innihald í virkseminum hjá kommunustýrum í fleiri smáum kommunum, enn at býta útreiðslur til aðrar kommunur, sum tær noyðast at keypa tænastur frá, so tær kunnu røkja lógarbundnu skyldurnar.

Í triðja lagi fer tað, at kommunurnar verða færri og størri, at gera, at tær fara at seta ein størri part av politisku dagsskránni: Tá kommunurnar verða javnari í støðd, verður eingin orsøk til at hava fleiri kommunufeløg, og kommunurnar fara at hava meira samljóðandi áhugamál.

Tí fara kommunurnar at hava nógv størri slagkraft, bæði í almenninginum og mótvegis landsmyndugleikunum, tá tær blíva meira javnlíkar.

Nógv av hesum snýr seg um hugburð - hvar vilja vit, at politisku avgerðirnar skulu takast - hvar meina vit, at politisku avgerðirnar verða tiknar best.

Tað hevur verið ført fram, at Føroyar ikki er størri enn ein miðal kommuna í grannalondum okkara, og tí eiga kommunurnar ikki at hava so nógv øki at umsita, sum kommunurnar í hesum londunum.

Men Føroyar er eitt land, ikki ein kommuna. Landið Føroyar hevur á leið somu uppgávur sum onnur lond, og munur eigur at vera á tí, kommunurnar í einum landi takast við, og tí landsmyndugleikarnar gera. So leingi sum so fá øki liggja hjá kommununum, noyðist Løgtingið at fáast við viðurskifti, ið náttúrliga hoyra heima hjá kommunustýrunum.

Enn ein týdningarmikil orsøk til at styrkja kommunurnar er tí, at líka mikið hvussu væl tingarbeiði verður skipað, so er mark fyri, hvussu nógv mál Løgtingið kann viðgera. So longi sum tingið átekur sær leiklutin sum lands-kommunustýri, fara tí at vera onnur stór politisk vandamál, sum stundir ikki verða til at viðgera politiskt.

### Vandamál á leiðini

Skal útleggingin virka, er tað tó eisini av stórum týdningi, at landið - so hvørt sum kommunurnar fáa fleiri øki at taka avgerð um - ikki samstundis læsir kommunurnar fastar í neyvum lógarásetingum, so at einki er eftir hjá lokala fólkaræðinum at ráða yvir.

Vit hava sæð hetta hent - bæði her hjá okkum og í øðrum londum.

Norra er t.d. eitt heldur ræðandi dømi, tí har er í dag trupult at fáa fólk til yvir høvur at hava hug til at fáast við kommunupolitikk - einki veruligt vald er eftir hjá kommunupolitikarunum; tey eru næstan bara lokalt vald statsembætisfólk, og hvør politikari tímir tað ?

- Fer landið so eisini at seta mark fyri kommunuskattin, soleiðis sum vit síggja tað í t.d. Íslandi, so verður lokala fólkaræðið av álvara hótt, tí innihaldið verður sogið úr tí aftur.

Verður hetta úrslitið, koma kommunurnar at ganga sum keisarin í sínum nýggja búna.

## VIÐMERKINGAR

# Fólksligari stýring

**Katrin Dahl Jakobsen**
*Valevni Javnaðarfloksins*
*til Tórshavnar býráð*



VAL04

Tá mál verða viðgjørd á tingi sum snúgva seg um tað at leggja eitthvørt út til kommunurnar at umsita, plagar argumentið at vera, "at so verður alt so nógv nærri borgaranum". Sama er at hoyra frá kommunupolitikarum. Hetta ljóðar rætt og rímiligt og átti at verið so. Men er tað nú so? Í hvussu stóran mun verða borgarar eftirspurdir ella tiknir við uppá ráð? Hvussu merkja tey henda øgiliga nærleika, og hvør minnist at hava verið við á borgarafundi? Væl vita vit, at avgerðirnar eru nærri borgaranum, verða tær fluttar yvir um Tinghúsvøllin og oman á Vaglið. Men borgarin merkir millum lítið og einki til tað. Tú kanst fara á býráðsfund at lurta. Og tað er tað. Skal nakað veruligt innihald vera í hesum nærleika, mugu hurðar latast upp, og fólkið sleppa framat. Til dømis við at skipa fyri spurnartímum, har formaðurin í t.d. sosialu nevnd greiðir frá ávísum ætlanum, og fólk, sum eru áhugað í hesum kunnu møta upp at spyrja. Somuleiðis má tað gerast lættari fyri borgaran at samskifta, fylgja við og kunna seg um, hvat veruliga fer fram í kommununi og siga sína hugsan um langtíðarætlanir og annað. Hugsi serliga um smáu kommunurnar, sum nú gerast partur av Tórshavnar Kommunu. Eg eri vís í, at livdi býráðið upp til hetta nærdemokratiið, so hevði tað fingið ríkiligt aftur frá eldhugaðum fólki sum komu við sínum ískoyti. Sjálvandi hevði tað kravt meira av politikarunum, tá tey ikki longur sluppu at sita og manererað aftanfyri rullugardinurnar. Men ikki minst, tað hevði verið so nógv stuttligari.



## VIÐMERKINGAR

# Góðs- og Ídnaðarhavnina í Ánunum, sum havnanevndin seinastu árini hevur arbeitt við

**Torleif Sigurðsson**
*varaborgarstjóri og*
*havnanevndarformaður*



VAL04

Tað var í seinnu helvt av 80'unum, at Býráðið tók fyrireikandi stig til byggjan av einari havn norðuri í Ánunum, sum skal hýsa virkseminum hjá millum øðrum sjóflutningsvinnuni og fiskaídnaði í Klaksvík. Semja var um, at trongligu umstøðurnar á vánni – hóast útbyggingar – ikki fóru at nøkta tørvin við framtíðini í huga. Hetta hevur kommunan síðani staðfest, tí teknisku anleggini á vestursíðuni halda ikki til ferðsluna og flutningin í samband við verandi virksemi. Hóast fleiri mió. kr. eru brúktar til at gera neyðugt dýpingararbeiði á vánni, er dýpið hjá djúptstingandi skipum, sum í dag vilja sigla upp á Klaksvík, ikki nøktandi.

Kreppan mitt í 90'unum førdi til, at allar ætlanir um kommunalar útbyggingar vórðu útsettar, tí lítið var til av peningi, og tørvurin hjá flutnings- og fiskivinnuni kundi tá – so dánt - nøktast. Síðani kom sum kunnugt skjót broyting í, og nú eru umstøðurnar á vestursíðuni ótolandi. Harafturat er bygt á tað seinasta økið, sum Klaksvíkar Havn hevði eftir, og sum var ætlað til fiskivinnu- ella havnaendamál.

Tá vit fyri 4 árum síðani tóku við býráðsleiðsluni varð ætlanin í Ánunum endurskoðað eisini við atliti til fasta sambandi um Leirvíksfjørð, sum uttan iva fer at hava broytingar við sær. Semja var um at halda fast við verkætlanina, tí brúk verður fyri einari havn í fiskivinnubýnum Klaksvík, sum gevur møguleikar til øll skip, sum sigla og væntast at fara sigla upp á Føroyar komandi mongu árini. Semja var eisini um, at Klaksvíkar Havn skal hava eitt havnaøki til flutningsvinnuna, sum skal verða tøkt og loyvi verður ikki givið til at byggja á hetta ávísa økið.

Í stuttum fevnir endurskoðaða verkætlanin í Ánunum um eitt havnaøki, sum verður yvir 20.000 fermetrar til støddar. Tann sunnara helvtin av havnaøkinum verður tøk hjá flutningsvinnuni og norðara helvtin verður tøk til flutnings-, goymslu- og ídnaðarbygningar. Kaisíðan, sum verður 200 metrar long verður gjørd við 30 metra ro-ro skráa í heimara endanum. Dýpið framman fyri kaisíðuna verður 12 metrar. Samlaður kostnaður av dagførdari ætlan er roknaður til smáar 40 mill. kr.

Tey eru fleiri, sum hava givið til kennar, hvørja áskoðan tey hava til ætlanina norðuri í Ánunum, fleiri eru fyri, og onkur er ímóti. Býráðið hevur eisini í fleiri umførum viðgjørt málið, og hevur oftast verið full semja um, at ætlanin skal fremjast skjótast gjørligt. Tí hevur kommunan brúkt umleið 10 mió. kr. til neyðugt útfyllingararbeiði, projekt o.a.

Tá arbeiðið at gera Norðoyatunnilin nærkaðist, gjørdist greitt, at fleiri fyrimunir vóru við at taka grótið til Ánirnar úr Norðoyatunnlinum, og tí varð ein avtala um grót gjørd millum tunnilsfelagið og kommununa. Tíverri eru seinkingar hjá Norðoyatunlinum orsøkin til, at havnin í Ánunum er seinkað.

Á vári 2003 var arbeiðið at gera kaikantin útbjóðað og átti J&K Petersen lægsta boð. Í august 2003 var avtala gjørd við J&K Petersen um at gera kaikantin, sum tilsamans er mettur at kosta einar 17 mió. kr. Nú er gongd komin á, og verður arbeiðið væntandi liðugt áðrenn summarferiuna í 2005, tá partur av havnini kann takast í nýtslu. Eftir er so endalig liðugtgerð av havnini, sum er mett til einar 10 mió. kr.

Spurningar sum Havnanevndarlimir o.o. oftani hoyra eru: hevur kommunan ráð til slíka verkætlan? hvussu verður arbeiðið fíggjað? og er vegasambandi til Ánirnar nøktandi ? v.m.

Kommunan hevur seinastu árini fleiri ferðir søkt landsstýrið um stuðul til útbyggingarnar á Klaksvíkar Havn, men hevur fingið noktandi svar í hvørjum føri. Hetta, hóast aðrar havnir hava fingið og fáa játtaðan stuðul til sínar verkætlanir. Tí hevur kommunan verið noydd til, í fleiri umførum og uttan stuðul, at leggja pening út til átrokandi verkætlanir á havnaøkinum, sum annars høvdu verið býttar millum land og kommunur.

Tey árini, tá lítlar og ongar íløgur vóru gjørdar á Klaksvíkar Havn gav rakst-urin eitt fitt avlop, sum var eitt gott íkast til slunkna kommunukassan. Afturat hesum skal roknast tann peningur, sum viðskiftafólkini (kundarnir) hjá Klaksvíkar Havn leggja eftir seg í kommununi. Havnanevndin hevur tað áskoðan, at nú má Klaksvíkar Havn fáa peningin aftur, til átrokandi verkætlanina í Ánunum, og hetta hevur býráðið samtykt.

Kommunan hevur dagført vegaætlanina í samband við Norðoyatunnilin, nýggju havnina í Ánunum, tungu ferðsluna o.a.. Nú verður arbeitt við kommunalu vegunum, har tað eisini liggur frammalaga, at gera vegasambandi gjøgnum býin til Ánirnar nøktandi, meðan bíðað verður eftir landsvegnum frá Oyravegnum til Ánavegin. Býráðið hevur staðiliga heitt á landsins mynduleikar um at virka fyri at hesin landsvegurin norður um fjall verður gjørdur skjótast gjørligt, og sum eitt natúrligt framhald av vegagerðini í samband við Norðoyatunnilin. Semja er millum landsvegamynduleika og kommunu um, at vegurin skal verða landsvegur, og at arbeiðið skal raðfestast.

Væntandi ganga ikki fleiri ár, áðrenn koyrandi verður frá øllum økjum í býnum eftir kommunala ringvegnum, og á landsvegnum á eystursíðuni norð til - millum annað - havnaøkið í Ánunum. Hetta er alt ein ætlan, sum býráðið miðvíst hevur arbeitt fram í móti seinastu árini.

# Kovboyar skjóta fyrst og spyrja aftaná. Rættir politikarar gera øvugt

**Hildur Eyðunsdóttir**
*Býráðslimur og valevni á*
*lista E*



VAL04

Nú skal hugsast

Okkurt valevni bjóðar seg fram við slagorðinum: "Nú skal handlast". Eg haldi at sitandi býráð hevur lært okkum, at tað eisini ber til at handla ov skjótt. Heilir býlingar verða bygdir uttan fyrilit fyri trivnað, við lítlum og ongum uttanumøki til familjurnar.

Hesa ferð vóni eg at tit velja fólk, sum geva sær stundir at hugsa, sum hava tíð at kjakast fyri at fáa bestu loysnirnar, og sum tora at kunna borgararnar og taka ímóti teirra viðmerkingum og ráðum til tær ætlanir sum eru fyri.

### Amboð til raðfestingar

Heildarætlanin er tað amboðið sum vit brúka, at fáa yvirlit yvir menningina í kommununi. Tað er í heildarætlanini og í fíggjarætlanini, at borgararnir kunnu síggja hvussu býráðið ætlar at kommunan skal mennast. Heildar-ætlanin er ikki ein fastløst ætlan, men ein tilgongd, ein raðfesting og ein skipað menningarleið. Men hon skal eisini veita tryggleika og vissu. Hon skal tryggja fólkinum í kommununi at skil er í útbyggingini, og at teirra bústaðir og íløgur ikki missa virði av skilaleysum útbyggingum.

Heildarætlanin er tað kortið, sum stýrt verður eftir, og har bogar og sker síggjast í góðari tíð, um vit velja at skifta kós. Hon skal tí áhaldandi dagførast, so hvørt sum vit fáa nýggja vitan og betri yvirlit, og eisini útgreinast í heildarætlanir fyri hvørt málsøki sær, bústaðir, ferðsla, skúlar, eldraøki, mentan o.s.fr.

Enn hava vit tíverri ikki sæð nógv til samskipan ella raðfestingar í røkka fram í tíðina. Tí síggja vit eisini býráðið renna á, nærum hvørja ferð nýggj kós verður sett. Hesum ætla vit í Tjóðveldisflokkinum at broyta. Vit vilja gera greiðar raðfestingar í fullum opinleika. Vit vilja at kommunan skal skipast so, at øll øki fáa røttu karmar at mennast eftir egnum fortreytum. Kommunusamanleggingin skal ikki merkja, at alt verður drigið til Havnar, men at vit fáa høvi at samskipa miðstaðarøki til frama fyri alla kommununa. Heildarætlanin skal hjálpa politikarum og borgarum, at fáa yvirlit yvir ætlaðu menningina, og fáa høvi at siga frá áðrenn býráðið ger okkurt býtt.

# E-dagur verður týsdagin

**Jógvan Arge**
*Valevni tjóðveldisfloksins*
*til Tórshavnar Býráð*



VAL04

Týsdagin gert tú av, hvussu Tórshavnar kommuna verður stýrd næstu fýra árini.

Listi E bjóðar seg fram at taka við leiðsluni í býráðnum.

Vit vilja fáa kommununa og Havnina aftur á beint eftir fýra ára herjan frá cocktailinum Jan og Heðin.

Vit vilja røkja áhugamálini hjá heildini og tryggja øllum borgarum rættvísa og virðiliga viðferð.

Vit virka fyri opinleika og gjøgnumskygni og vilja hoyra borgararnar í málum, sum viðkoma teimum.

Vit seta trivnaðin í hásætið og fara at rudda upp í byggióskilinum kring um í kommununi.

Vit seta okkum fyri sum skjótast at nøkta tann bráðneyðuga tørvin á ellis- og røktarheimum.

Vit vilja hava frítíðarskúla fyri 2. og 3. flokk og menna barnaansingina á stovnunum.

Vit halda, tað er umráðandi at dagføra og menna skúlarnar í allari kommununi.

Við okkum við róðrið fáa mentan, ítróttur og frítíðarlív sum heild bestu sømdir

Vit halda, at kommunan eigur at átaka sær at eggja til nýtt virksemi og nýggjar vinnur.

Vinnulívinum verður tryggjað góð kor og vakstrarmøguleikar, tí vinna og trivnaður eru tvær síður av somu søk.

Vit vilja tryggja lív og menning á øllum plássum í Tórshavnar kommunu við virðing fyri teirra sereyðkennum og møguleikum.

Bussleiðin og ferðasambandið til bygdir og oyggjar verða útbygd.

Framtíðarætlanirnar fyri kommununa verða endurskoðaðar við atliti til trivnað og umhvørvi eins og javnvág millum býarpartar.

Og fram um alt ætla vit at reka ein skilagóðan fíggjarpolitikk.

Týsdagurin verður E-dagur.

Listi E vil fjálga um teg.

Gott val.